# Misskilja avtalu ímillum føroyingar og íslendingar

**– Krevja føroyingar broytingar, krevja íslendingar eisini broytingar og tað kann raka føroyingar nokk so hart, heldur formaðurin í Reiðarafelagnum**



*– Vit eiga at royna at broyta býtið ímillum føroyingar og íslendingar, hóast tað verður alt annað enn lætt, heldur Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum*

FISKISKAPUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit hava roynt ár um ár, men íslendingar hava hvørki verið til at høgt ella stungið í.

Jákup Sólstein er ikki heilt nøgdur við ávísar partar í tí fiskivinnusamstarvi, føroyingar hava við íslendingar.

Sostatt er formaðurin í Reiðarafelagnum samdur við Atla Hansen, reiðara, Hendrik Old, formanni í vinnunevndini og Johan Dahl, løgtingsmanni tá ið teir í Sosialinum í gjár hildu, at tað er neyðugt at broyta fiskiveiðisamstarvið ímillum Føroyar og Ísland.

Men Jákup Sólstein staðfestir samstundis, at nógv av tí, sum Atli Hansen og teir nevna í Sosialinum í gjár, er ein misskiljing, tí trupulleikin í samstarvinum við íslendingar er ein heilt annar enn tann, sum teir føra fram.

## Tola ikki so stórt trýst

Fyri nøkrum árum síðani gjørdu føroyingar og íslendingar eina serliga avtalu um, at vit kunnu frítt fiska svartkjaft inni hjá hvørjum øðrum.

Men í Sosialinum í gjár hildu reiðarar og politikarar, at íslendingar hava so stóran fyrimun av hesi avtaluni, at hon má broytast.

Og tað heldur formaðurin í Reiðarafelagnum eisini.

Men hon skal broytast av heilt øðrum orsøkum enn teimum, sum verða nevndar í Sosialinum í gjár.

Hann staðfestir nevniliga, at tað er neyðugt at gera nakrar rættleiðingar til tað, sum Atli Hansen og Johan Dahl føra fram í Sosialinum.

– Fyri tað fyrsta er tað heilt burturvið at brúka 2006 sum dømi um, hvussu stóran fyrimun íslendingar hava. Íslendingar hava longu fiskað at kalla tað, sum teir ætla sær at fiska undir Føroyum av svartkjafti í ár, men okkara fiskiskapur undir Íslandi er valla byrjaður enn, so tað gevur eina heilt skeiva mynd av støðuni.

Hinvegin leggur hann eisini dent á, at í hesum føri er heldur ikki talan um, at vit geva íslendingum eina svartkjaftakvotu upp á 200.000 tons.

– Tað, sum hendan svartkjaftaavtalan snýr seg um, er, at føroyingar og íslendingar kunnu frítt fiska svartkjaft inni hjá hvørjum øðrum av teirri kvotu, sum londini bæði annars hava av svartkjafti.

Og í ár er støðan altso tann, at higartil í ár hava íslendingar hava fiskað 200.000 tons undir Føroyum.

– Tí er tað rætt, at broyta avtaluna, tí so stórt trýst tola vit ikki, sigur Jàkup Sólstein.

Akkurát hvussu broytingin skal vera, hevur hann ikki gjørt sær greitt.

– Men tað verður neyðugt at áseta eitt hámark fyri, hvussu nógv tons, vit kunnu fiska inni hjá hvørjum øðrum av svartkjafti.

Hansara boð er, at íslendingar eiga ikki at fáa loyvi at fiska meiri enn í mesta lagi eini 100.000 tons av svartkjafti undir Føroyum og so kundu vit fiska áleið tað sama undir Íslandi.

– Eitt slíkt býti kundi verið hóskandi, heldur Jákup Sólstein.

– Sum støðan er nú, er alt ov nógv virksemi undir Føroyum og tí kundu vit hugsa okkum at avtalan við íslendingar varð broytt, so at betri javnvág varð í.

Hann vísir á, at Føroyaøkið er ov lítið til, at tað er pláss fyri, at íslendingar fiska 200.000 tons av svartkjafti í økinum, samstundis, sum vit eisini hava avtalur við Russland og ES um at fiska svartkjaft undir Føroyum, umframt at okkara egnu skip eisini skulu framat.

## Alt annað enn lætt

Men samstundis ásannar formaðurin í Reiðarafelagnum, at tað verður alt annað enn lætt at pilka við avtaluna.

– Føroyingar hava ferð eftir ferð roynt at fáa broytingar. Men her hava íslendingar ikki verið til at vika. Teir hava tvørturímóti hótt við, at skal hendan avtalan broytast, verður eisini neyðugt at broyta aðrar fiskiveiðiavtalur ímillum londini bæði.

Her sipa teir til botnfiskakvotuna, sum vit hava undir Íslandi.

Og hana vil Jákup Sólstein ikki missa.

Tí er hann ikki við upp á at skerja íslendsku svartkjaftafiskiskapin undir Føroyum, vissi tað skal raka okkara botnfiskakvotu undir Íslandi.

– Tað vildi verið skeivt, tí tað hevði rakt okkum nokk so hart, leggur hann afturat.

– Men vit eiga áhaldandi at føra skilagóðar orsøkir fram fyri at sannføra íslendingar um, at tað er ikki rímiligt, at teir fiska so nógvan svartkjaft inni hjá okkum.

Hinvegin sigur Jákup Sólstein, at vit eiga heldur ikki at gloyma, at tað hevur eisini týdning fyri føroyingar at hava rætt at fiska svartkjaft undir Íslandi.

Hann staðfestir eisini, at tað er skeivt, tá ið tað verður sagt, at føroysk uppisjóvarskip, sum royna undir Íslandi, hava ikki loyvi at virka fiskin umborð.

– Tað er bara galdandi fyri lodnu. Annars kunnu vit virka svartkjaft og allan annan fisk umborð, eins og vit kunnu avreiða, akkurát, har vit vilja.

Í hesum sambandi vísir formaðurin í Reiðarafelagnum á, at Atlantic Navigator, fiskar undir Íslandi og virkar fiskin umborð.

## FAKTA

Í Sosialinum í gjár varð víst á, at higartil í ár hava íslendingar fiskað 200.000 tons av svartkjafti undir Føroyum, men vit hava valla fiskað ein stert undir Íslandi.

– Tí má eitt javnari býti fáast og føroyingar eiga at fáa betri sømdir frá íslendingum, halda reiðarar og politikarar.

Teir vísa eisini á ein annan skeivleika og tað er, at føroyingar kunnu ikki fiska lodnu og annan uppisjóvarfisk undir Íslandi og avreiða til virkingar í Føroyum. Ei heldur kunnu okkara framleiðsluskip fiska uppisjóvarfisk undir Ìslandi virka fiskin umborð til matna og harvið økja um veiðuvirðið.

Hinvegin hava íslendingar hesi seinastu árini fingið sær fleiri verksmiðjutrolarar til uppisjóvarfisk og teir kunnu fiska undir Føroyum og virka fiskin umborð til matna,

Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum, sigur, at hetta eru misskiljingar, tí tað er als ikki her, at trupulleikin er.

# Ein heilt onnur verð hjá rossafólki í Havn

**Í dag fær Føroya Ríðingarfelag eina høll, sum stendur altjóða mát og tað verður ein heilt onnur verð hjá teimum, sum hava ross**



*Hans Vilhelm Lützen, formaður í Føroya Ríðingarfelag fegnast um, at tað nú loksins er eydnast at fáa fáa ríðihøllina í Havnardali upp, tí hetta fer at geva teimum heilt aðrar møguleikar*

ROSSAHALD

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Seinnapartin í dag verður ein stór løta hjá øllum, sum hava áhuga fyri rossum.

Tí í dag er loksins dagurin komin, tá ið ríðihøllin í Havnardali verður reist.

Tað er Føroya Ríðingarfelag, sum hevur tikið hetta stigið. Hetta er ein ætlan, sum felagið hevur arbeitt við seinastu trý árini og tí verður tað ein stórur dagur, nú høllin kann takast í brúk.

– Hetta er eitt ógvuliga stórt framstig fyri føroyska ríðing, tí vit hava longst illa eftir at fáa eina høll, sigur Hans Vilhelm Lützen, formaður í Føroya Ríðingarfelag.

Hann sigur, at hetta fer at geva teimum heilt aðrar møguleikar.

Høllin er stór, hon er 60 x 27 metrar, ella 1620 fermetrar til støddar og sostatt stendur hon altjóða mát.

Talan er um eina høll, sum hevur staðið á bryggjuni í Havn, men sum varð boðin út fyri einum trimum árum síðani.

Tað endaði við, at Føroya Ríðingarfelag fekk høllina og síðani hevur verið bíðað eftir at umstøður skuldi vera at reisa hana í Havnardali.

Ímeðan hava tey grivið út og slættað eitt stykkið upp á 6000 fermetrar, umframt at fjós eru bygd tætt við og nú er høllin reist.

Hans Vilhelm Lützen sigur, at nú høllin er komin, verða heilt aðrir møguleikar at ríða og venja ross.

– Nú kunnu vit ríða og venja ross innandura tá ið veðrið ikki er til vildar so tað er ein stórur fyrimunur.

Av tí at venjingarmøguleikarnir koma upp á eitt heilt annað støðið, fer tað eisini at geva teimum munandi betri møguleikar at vera við í kappingum.

Men tað ber eisini til at hava onnur tiltøk í høllini, eitt nú neytasýningar, seyðasýningar, ella hvat tað kann vera av slíkum slagi.

Tilsamans er talan um eina íløgu upp á fimm milliónir. Í løtuni eru 400 limir í Føroya Ríðingarfelag og úti í Havnardali er nú pláss fyri 150 rossum. Annars eru eini 220 ross í Havn.